# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Sofía Mohr 80 ár



*Sofía saman við sínum átta børnum. Aftara rað f.v.: Hallur Mohr, Tórshavn, Jákup Mohr, Runavík, Rannvá Hyrd-Hansen, Skævinge (Danmark), og Petur Mohr, Runavík*
*Fremra rað f.v.: Berit Madsen, Kambsdalur, Ásla Poulsen, Kambsdalur, Fía Mohr, Fuglafjørður, Anna Mohr, Hósvík, og Rani Mohr, Korsør (Danmark)*

*Mynd: Hans Mohr*

Týsdagin 20. desember fylti Sofía Mohr, vanliga nevnd Fía, í Fuglafirði 80 ár.

Fía vaks upp í Leirvík. Pápin, Petur Hans Kristiansen, var ættaður av Skála. Hann giftist til Leirvíkar við Annu í Jógvansstovu. Í 1939 doyr Anna á barsilssong, og eftir sat maðurin við børnunum: Kjartan, Jógvan, Fía og Oda.

Tá Anna doyði, vóru maðurin og synirnir til skips. Vanlagnuna frættu teir um, tá ið teir komu aftur nakrar vikur seinni. Hóast bert 14 ára gomul, helt Fía hús. Men teirra royndir vóru ikki av. Meðan kríggið reikaði, brast ein mina í fjøruni, og húsini hjá teimum fóru í smildur. Tíbetur hendi eingin mansskaði, men hetta gjørdi, at tey fluttu til Fuglafjarðar at búgva.

Fyrstu tíðina leigaðu tey, men síðan fingu tey síni egnu hús. Í Fuglafirði hitti Fía Henry Mohr, sum hon giftist við. Teirra hjúnarlag vardi ikk leingi, tí longu í 1970 doyr Henry. Sum um tað ikki var nokk, brendu húsini 5ár seinni, í 1975.

Fía og Henry fingu átta børn, fýra synir og fýra døtur í hesi raðfylgju: Jákup, Anna, Hallur, Petur, Berit, Rannvá, Rani og Ásla.

Hóast mong munnu halda, at livið hjá Fíu ikki hevur verið nakar dansur á rósum, hevur hon fingið øll 8 børnini væl undan. Hetta sást eisini føðingardagin, tá eftirkomarar hennara saman við næstringum fyltu Lonina. Hóast sín høga aldur, sat hon til háborðs og tók í móti øllum gestunum.

Góða Fía. Frá børnunum og famjum teirra verður tær ynskt eini gleðilig jól og eitt av Harranum signað nýggjár.

## Góði Emil



*Hjartaliga tillukku við 90 ára føðingardegnum.*
*Má sumbiarhjarta sláa hátt sum brim móti*
*Beinisvørð á nátt.*
*Sum frísarnir í Akrabergi,*
*tú sprottin er úr góðum mergi.*
*Sum himins stjørnuskarðar,*
*tú reisti bókavarðar.*
*Tú høvdingurin fræði,*
*gav út alt Føroya kvæði.*
*Á seggjabringu sterku*
*nú prýða heiðursmerki.*

**Frændi tín Arnold Eyvindsson við fam.**

†

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Joen Jacob Joensen** fer úr Skopunar kirkju hósdagin kl. 12.00. Sálmabókin verður nýtt.

**Jens Christian Dam,** ættaður úr Tórshavn, búsitandi í Kaldbak, andaðist á Landssjúkrahúsinum týsdagin 20. desember, 62 ára gamal. Farið verður úr kapellinum hósdagin klokkan 17. í Vesturkirkjuna. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni Tollaksmessudag klokkan 13. Tey, ið vilja minnast Jens Christian, kunnu lata eina gávu til Leguhúsið í Nesvík.

**Páll Poulsen**, Argir, andaðist í Danmark sunnudagin 18. desember, 48 ára gamal. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

## Dagurin í morgin

**22. desember. Japetus**. Ókent halgimenni, men kanska hevur hann navn eftir Jafeti, soni Nóa.
*Sólstøður*, stytsti dagur.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá okkara kæra móðir, vermóðir, omma og langomma

**Sára Malena Højgaard**
Toftir

andaðist og varð jarðað.

Tøkk fyri blómur og gávur.
Tøkk til tykkum, sum á ymiskan hátt hjálptu til við jarðarferðini og øllum tykkum, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**John, Lenni, Poula, Elly, Jack, Heðin, Hervør, Sólvør og Eydna við familju**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit tykkum øllum, sum á ymiskan hátt gleddu okkum á gullbrúdleypsdegi okkara tann 15. desember.

Somuleiðis vilja vit ynskja familju, vinum og kenningum eini gleðilig jól og eitt av Harranum signað nýggjár.

**Elia og Ingvard Poulsen, Skáli**